

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 01 - 2013

# Al-Qaida í hernað móti oljufeløgum

Yvirgangsfelagsskapurin al-Qaida hevur eftir øllum at døma bjóðað oljufeløgum, sum arbeiða í Afrika, av. Hetta hendir eftir, at franski herurin er farin í kríggj móti islamiskum yvirgangsfelagsskapum í afrikanska oyðimarkarlandinum Mali. Í morgun gjørdu al-Qaida terroristar álop á eina oljustøð í eystara partinum av Algerie, drupu fleiri fólk og tóku fleiri gíslar. Oljustøðina reka feløgini Statoil, BP og Sonatrach. Tað ljóðar, at ein norðmaður, ein breti og fimm japanesarar eru tiknir gíslar skrivar heimasíðan E24.no. Umleið 10 norðmenn arbeiða á oljustøðini í In Amenas, sum liggur nær markinum til Libya. Norskir myndugleikar meta støðuna sera álvarsliga. Statoil umboð siga, at hetta er fyrstu ferð, at Statoil arbeiðarar hava verið úti fyri slíkum. Franska blaðið Le Parisien skrivar, at tað eru islamistar frá al-Quiada úr Norður Mali, sum standa aftanfyri álopinum. Hildið verður, at álopið er eitt svar uppá fronsku uppíleggingina í stríðnum í Mali, har víðgongdir islamistar royna at hertaka alt landið og skipa tað sum eitt víðgongt islamiskt land. Eisini lond sum Danmark og Svøríki hava játtað at senda hjálp til Mali, eitt nú flutningsflogfør, sum fronsku hermenninir kunnu brúka, tá teir flyta síni herfólk til hermótini fyri norðan. ST mælir limalondum sínum til at stuðla stríðnum móti víðgongdu islamistunum.